**Úr grannalondum**

*Lagt til rættis: Árni Joensen*

# Jarðskjálvtin í Finnlandi skakar alt Evropa

**Tað var ikki bara eitt sokallað skriðuval, tá tann høgravendi flokkurin Sannfinländarna ferfaldaði sín veljaraskara á finska ríkisdagsvalinum um vikuskiftið. Tað var einki minni enn ein politiskur jarðskjálvti, sum kann skaka alt Evropa**

559.342. Tað var atkvøðutalið hjá Sannfinländarna á valinum sunnudagin samanborið við 112.252 á seinasta vali, og við góðum 19 prosentum av atkvøðunum og 39 ríkisdagslimum er flokkurin vorðin ein týðandi leikari á tí politiska pallinum. Fyribils í Finnlandi, men hann kann eisini fáa týdning langt út um finska landamarkið.

Tann avgerandi spurningurin er, um flokkurin kemur í stjórnarsamgongu nú eftir valið og kann gera síni sjónarmið galdandi uttan fyri Finnland. Timo Soini, floksformaður og felagar hansara eru ikki ES-stuðlar, og flokkurin er millum annað sera ivingarsamur um kreppupakkarnar, sum ES hevur latið og kanska skal lata kreppuraktum limalondum.

– Royndirnar vísa, at pakkarnir virka als ikki, og lond í kreppu skulu ikki hava finskar pengar, sigur Timo Soini. Ein treyt fyri kreppupakkunum hjá ES er, at tað er semja, og sigur Finnland nei, verða ikki fleiri pakkar at lata. Tí hevur finska valúrslitið elvt til stúran í eitt nú Portugal.



*Timo Soini: -Úrslitið var ein sigur fyri tað finska fólkið*

Mynd: Aftenposten

Sannfinländarna er ein flokkur fyri finnar, og flokkurin hevur sagt, at hann fer at virka fyri strangari reglum á innflytaraøkinum, eins og hann vil hava svenskt úr finska skúlaverkinum.

– Hetta er ein sigur fyri tað finska fólkið. Tað ber ikki til at lata teir gomlu flokkarnar stýra eitt árstíggju fyri og annað eftir, segði Timo Soini við svenska sjónvarpið aftan á valsigurin.

Sum væntað bleiv Savningarflokkurin tann størsti á valinum um vikuskiftið, og flokkurin hevur sagt, at hann er til reiðar at samstarva við allar flokkar í stjórn.

# Miðbýurin í Oslo kann blíva sum Manhattan

**Fólkatalið í norska høvuðsstaðnum veksur skjótt, men bústaðarútboðið er lítið, og tað togar prísirnar upp ígjøgnum**

Tað er ikki bíligt at seta seg niður í Oslo. Skalt tú keypa tær eina íbúð, skalt tú leggja knappar 46.000 norskar krónur á borðið fyri hvønn fermetur, og tað er 3.000 krónur meiri enn fyri bara fýra mánaðum síðani. Og tað verður verri enn. Erling Dokk Holm, granskari, sigur við blaðið VG, at um eini 10 - 15 ár fer fermetraprísurin í tí dýrasta býarpartinum upp á 100.000 krónur.



*Manhattan, har nógv arbeiða, men har bara tey ríku hava ráð at búgva. Er tað framtíðarinnar Oslo? (Mynd: VG)*

Hagtølini vísa, at fólkatalið í Oslo veksur millum 12.000 og 16.000 um árið, men at tað koma bara millum 1.200 og 1.300 nýggir nýggir bústaðir afturat árliga. Hendan gongdin fær einstakar politikarar at ávara um, at Oslo kann blíva sum New York-býarparturin Manhattan, hagar fólk koma til arbeiðis, men har bara tey ríkastu hava ráð at búgva. Granskarin er samdur við politikarunum.

– Vit fáa eitt stættarbýti í umráðnum, tí tað verða bara tey ovastu í miðalstættini og tey longri uppi á stættastiganum, sum fara at hava ráð at búgva har, sigur Erling Dokk Holm.

Framrokningar vísa, at um 20 ár verður fólkatalið í Oslo 200.000 størri enn nú.

# Hótta ongan stovn

Á hvørjum ári fara nógvir stuttleikafiskimenn til Noregs at fiska tosk inni á firðunum, og tað hevur fingið útróðrarmenn og onnur at kæra seg um, at hetta tolir stovnurin ikki.

Norska havrannsóknarstovan hevur nú kannað viðurskiftini, og hennara greiða niðurstøða er, at stuttleikafiskiskapurin hóttir hvørki toskin inni á firðunum ella nakran annan stovn. Tað skrivar Nordlys.

Hinvegin er ivi um, hvussu nógvan fisk stuttleikafiskimenninir veruliga fiska. Í 2009 vísti ein vísindalig kanning, at fremmandir stuttleikafiskimenn fiskaðu 3.336 tons av toski og øðrum fiski. Tað er munandi minni, enn fólk mettu fyri tíggju árum síðani. Tá bleiv sagt, at teir fremmandu stuttleikafiskimenninir fiskaðu millum 12.000 og 15.000 tons um árið.

# Íslendingar rýma úr kirkjuni



Á nýggjárinum vóru 183.697 íslendingar, sum vóru 18 ár og eldri, limir í fólkakirkjuni ella tjóðkirkjuni, sum tann almenna kirkjan í Íslandi verður rópt. Tað svarar til 77,2 prosent av fólkinum. Eitt ár frammanundan vóru 78,8 prosent í fólkakirkjuni ella 3.000 fleiri enn nú.

Tað sæst í tølum hjá hagstovuni í Reykjavík. Har sæst, at 5.092 fólk fóru úr teirri almennu kirkjuni í fjør, og tað er næstan helvtina fleiri enn í 2009.

Hagtølini vísa eisini, at tann katólska kirkjan er tað næststørsta trúarsamfelagið í Íslandi við 6.366 limum 18 ár og eldri. Í fjør fekk tann katólska kirkjan 653 nýggjar limir.

# Góð fráfaringarløn

Herfyri fekk Søren Eriksen sekkin sum stjóri í tí a 6lmenna danska tokfelagnum DSB, tí óskil var í fíggjarviðurskiftum felagsins. Men hann hevur onga neyð. Nú er komið undan kavi, at Søren Eriksen fær fýra milliónir krónur í fráfaringarsamsýning umframt løn í eitt ár, sum er aðrar fýra milliónir krónur. Men tað er ikki alt. Í gjár kom fram, at frákoyrdi stjórin skal eisini hava eina millión krónur í bonus umframt 0,7 millión krónur fyri sítt avrik í 2010. Tilsamans fær hann sostatt 9,7 milliónir krónur fyri at fáa sekkin.